## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum minus 2 og minus 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinni av ymsum ættum. Turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Um kvøldið fRískar hann vindin av suðri og regn. Lýggjari.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkandi vind av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 5 stig. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin um 7 stig.



# Lena og Niclas spældu og skrivaðu autografarar

**Í tveir dagar hava Lena og Niclas vitjað Suðuroynna. Mikudagin var konsert í Vágs Skúla**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Konsertin var partur av Listaleypinum, sum øllum skúlum stendur í boði at velja sær mentanartilboð úr. Trongisvágs Skúli og Vágs Skúli fingu vitjan av Lenu og Niclas.

Konsertin í Vágs Skúla fyrrapartin eydnaðist væl og livandi ljós og livandi tónleikur settu dám á skúladagin.

Næmingarnir sluppu at klappa, syngja og leika á slagverk í síðsta lagnum, og sum heild eydnaðist stak væl hjá Lenu at fáa næmingarnar við í framførsluna.

Aftan á framførsluna vísti tað seg eisini, at flestu næmingar vildu hava autograf, og tað var ikki smávegis skriving, ið Lena mátti skriva, tí í Vágs Skúla eru langt omanfyri 200 næmingar, og eisini vóru børn úr skúlum í grannabygdunum á vitjan.



# Nýggj hárfríðkanarstova í Vági

Mikudagin lat upp nýggj hárfríðkanarstova í Vági. Tað er Eyðbjørg Skaalum, ið eigur og rekur Salong Eyðbjørg.

Hon hevur í fleiri ár havt hárfríðkanarstovu í Hvalba, og nú ein møguleiki var at lata upp í Vági, tók hon av.

Salong Eyðbjørg liggur væl fyri á Vágsvegi, ið má sigast at vera høvuðsvegur í Vági, og hon er nýmótans í sniði, og prýðir bygdamyndina.

-do-

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 11 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 18 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 969 hPa. við Lofoten gevur framvegis kalt luftrák av norði móti Føroyum.



Í dag:
Lágtrýstið yvir Norður-Noreg viknar.
Hátrýstið yvir Grønlandi viknar eisini .




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/11 kl. 06[00] – 19/11 06[00]. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í november: -4,0° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 18/11 kl. 06[00] – 19/11 06[00].
Avfallið higartil í november: 38 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

14. novembur Mánin næstur jørðini
19. novembur Seinna kvarter
27. novembur Tendring
29. novembur Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. nov | 0:40 | 13:17 | - | 12:17 | - | 12:32 | 2:40 | 15:17 | 3:40 | 16:17 | 11:32 | 23:53 | 10:32 | 22:53 | 0:55 | 13:32 | 1:55 | 14:32 | 0:25 | 13:02 | 1:40 | 14:17 |
| 21. nov | 1:38 | 13:59 | 0:38 | 12:59 | 0:53 | 13:14 | 3:38 | 15:59 | 4:38 | 16:59 | - | 12:14 | 11:14 | 23:34 | 1:53 | 14:14 | 2:53 | 15:14 | 1:23 | 13:44 | 2:38 | 14:59 |
| 22. nov | 2:19 | 14:40 | 1:19 | 13:40 | 1:34 | 13:55 | 4:19 | 16:40 | 5:19 | 17:40 | 0:34 | 12:55 | 11:55 | - | 2:34 | 14:55 | 3:34 | 15:55 | 2:04 | 14:25 | 3:19 | 15:40 |
| 23. nov | 3:00 | 15:21 | 2:00 | 14:21 | 2:15 | 14:36 | 5:00 | 17:21 | 6:00 | 18:21 | 1:15 | 13:36 | 0:15 | 12:36 | 3:15 | 15:36 | 4:15 | 16:36 | 2:45 | 15:06 | 4:00 | 16:21 |
| 24. nov | 3:42 | 16:03 | 2:42 | 15:03 | 2:57 | 15:18 | 5:42 | 18:03 | 6:42 | 19:03 | 1:57 | 14:18 | 0:57 | 13:18 | 3:57 | 16:18 | 4:57 | 17:18 | 3:27 | 15:48 | 4:42 | 17:03 |